gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Sektin á umhvørvið!

Norðurlandaráðið hevur í hesum døgum eina ráðstevnu um, hvussu Norðurlond kunnu gerast meiri burðardygg. M.a. leggur ráðstevnan dent á umhvørvið og ta hóttan, sum dálking hevur á náttúrutilfeingið. Júst hesin tátturin hevur fingið Norðurlond at harmast um eina skelkandi avgerð hjá amerikansku stjórnini.

George W. Bush – maðurin, fólkaflokkurin rósti til skýggjað – hevði ikki verið forseti í eitt fjerðingsár, tá amerikanska stjórnin leypt frá avtaluni í Kyoto um at lækka nøgdirnar av vakstrarhúsgassið, CO2, sum serliga ídnaðurin letur út í luftina. Veðurlagsserfrøðingar eru sannførdir um, at tað stór útlátið av vakstrarhúsgassið ger, at tað verður heitari á klótuni, og at tað er til óbótiligan skaða. Avtalan í Kyoto frá 1997 var tí ein marknasteinur at fáa bilbukt við hesum partinum av dálkingini.

Men nýggi amerikanski forsetin er lopin frá hesi avtaluni, sum tað tók eini 10 ár at fáa upp á pláss, og tað hevur hann gjørt fyri at tæna egnum snævurskygdum fíggjarligum áhugamálum. Fyri at takka amerikanska ídnaðinum, m.a. orkuídnaðinum, sum stuðlaði republikanska forsetavalevninum, hevur George W. Bush, tikið allan heimin sum gísla, eins og hann hevur sett umhvørvismálaráðharran til viks í hesum máli.

Grundgevingin fyri at renna undan Kyoto-avtaluni er, at menningarlondini klára kanska ikki ásetingarnar at í hesi avtaluni, sum eftir einum ávísum áramáli skal lækka CO2 avtaluni. Í hesum sambandi skulu vit hava í huga, at amerikanski parturin av útlátinum tilsamans er meiri enn 36 prosent!

Nú kann onkur spyrja, hvat viðkemur hetta mál okkum. Jú, øll tilvera okkara byggir á umhvørvið, serliga havumhvørvið, og tí mugu vit gera vart við okkum, tá tað snýr seg um tiltøk til frama fyri umhvørvinum. Tí mugu vit eisini vóna, at hini londini annaðhvørt megna at gera eina avtalu uttan USA ella eina nýggja avtalu, sum “Big brother” kann góðtaka.

**Sosialurin**

# Sosialurin borin út um kvøldið

**Haldarar í miðstaðarøkinum fáa nú Sosialin bornan út um kvøldið**

BLAÐÚTBERING
*Eirikur Lindenskov*

Fólk í Havn og har um vegir, sum halda Sosialin, fingu fyri fyrstu ferð týsdagsblaðið borið út mánakvøldið.

Frá 1. apríl í ár at rokna, er tað Prentmiðstøðin, sum stendur fyri útberingini av bløðunum.

Orsøkin til, at útberingin nú er løgd undir Prentmiðstøðina, sum Sosialurin og Dimmalætting eiga í felag, er eitt gamalt ynski um at fáa bløðini borin út um kvøldið. Hesum ynski hevur Postverk Føroya ikki kunna eftirlíkað, og tá Postverkið gavst við postútbering leygardag, var einki annað hjá bløðunum at gera, enn sjálv at fáa bløðini út.


*Haldarar rinda einans 5 krónur 76 oyru fyri Sosialin - sum tey fáa bornan til dyrnar – í miðstaðarøkinum í flestu førum áðrenn kl 19 á kvøldi*

Síðani tá hava haldarar fingið leygardagsblaðið fríggjakvøld. Hetta hava haldara okkara verið fegnir um, og tá vit gjøgnum Prentmiðstøðina hava fingið hesa útbering í eina fasta og trygga legu, verður henda tænasta nú víðkað til at fevna um allar útgávurnar - fyribils tó bert í miðstaðarøkinum. Haldarar kring landið annars fáa týsdags- til fríggjadagsblaðið borið við postinum sum vant.

Tey, ið fáa blaðið borið út kvøldið fyri, eru haldarar í postøkjunum 100 Tórshavn, 160 Argir, 187 Hvítanes og 188 Hoyvík. Treytin er, at brævsprekka ella postkassi er á bústaðnum. At halda Sosialin kostar 360 krónur um ársfjórðingin. Tað merkir, at sum haldari rindar tú 5 krónur og 76 oyru fyri hvørt blað, og túført tað borið til dyrnar á kvøldi. Til ber at tekna seg sum haldara við at fylla út lepan á síðu 37, so ført tú blaðið borið dagin eftir.

# Plátufelagið Tutl nýggj høli

TÍÐINDASKRIV
*Tutl*




Tónleikahandilin og skrivstovan hjá Tutl eru fluttur 30 metrar longur niðan í Gongini í Havn. Talan er um kjallaran, har Eivind í Gongini einaferð hevði blómuhandil.

Sjálvt um hesi nýggju hølini eru nógv minni enn tey gomlu í Fútastovu, so eru fólk framvegis vælkomin inn á gólvið hjá Tutl.

Í sambandi við flytanina hevur nevndin í Plátufelagnum Tutl gjørt av at umskipa virksemið. Nú verður minni orka nýtt til at selja tann tónleik, sum fæst alla aðrastaðni.

Plátufelagið miðar eftir at gera eitt størri og betri arbeiði fyri felagsins tónleikaútgávur og tey sølustøð, sum Tutl samstarvar við runt um í landinum. Tó verður nakað av handilsvirksemi framyvir. Hetta fer serliga at umfata sølu av tónleiki, sum ikki fæst aðrastaðni. Um fólk hava serlig ynski, kann Tutl eisini útvega tað mesta.

Haraftrat tekur Tutl eisini ímóti bíleggingum um telefon og sendir runt um alt landið. Á hillunum í nýggju hølunum hjá Tutl verður allur føroyskur tónleikur, klassiskt, jazz og fólkatónleikur o.a. Sum einasta stað í landinum hevur Tutl eisini eitt stórt úrval av bíligum brúktum fløgum av øllum tónleikaslag. So framvegis verður spennandi at koma inn á gólvið hjá Tutl.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult cyan magenta svart



